# 20 ára jubileums-konsert við REVIVAL

Rockbólkurin REVIVAL, ið kann metast at vera heimskendur í suðuroy, heldur 20 ára jubileums-konsert í TB húsinum á Tvøroyri leygarkvøldið. Bólkurin er eisini sera vælkendur millum føroyingar í Danmark, har teir plaga at spæla til veitslur og tiltøk. Við á konsertini verða upprunalimirnir sum gestaleikarar. Eisini verður guitar burturlutaður millum dansifólkið.

2. jólakvøld í 1989 fór suðuroyarbólkurin Revival fyri fyrstu ferð á pall. Bólkurin var tá mannaður við Jens Harry Jespersen á guitar, Jóannes Hofgaard á bas, Dánjal Jákup Holm á trummum og Súsannu Holm sang. Bólkurin spældi aktuellan rocktónleik og bleiv beinavegin væl umtøktur.

Aftan á eitt ár fór Súsanna úr og Jens Harry tók yvir sum sangari. Bólkurin var nú ein sterk trio og fór at spæla harari rock tónleik sum Guns´N Roses, Nirvana. Mótin bleiv eisini har eftir, langt hár og leðurklæðir.




Skjótt vóru teir við á øllum teimum stóru konsertinum í Føroyum, sum Ólavsøkukonsertin, Tungmálmur 2, Futti á ferð, Nýggjárskonsertin osv.

Teir valdu eisini at styrkja bólkin við guitarleikaranum Jón Joensen.

Í 1994 valdu Jens Harry og Jóannes at fara til Danmarkar at lesa. Jens Harry skuldi lesa til farmaceut og Jóannes til lívfrøðing. Hetta mundi gjørt enda á Revival, tí Dánjal Jákup var verandi í Føroyum. Men stutt aftaná fingu teir Petur Dalsgaard at spæla trummur. Hann var eisini akkurát fluttur til Keypmannahavn fyri at lesa til farmaceut.

Bólkurin fór nú at sikta meir eftir at spæla til dans har teir kundu, og skjótt vóru teir fastir gestir á mongun dansistøðum í Keypmannahavn.

Í summarferiunum, og tá tað annars bar til, spældi Revival til dans í Føroyum. Og TB húsið var altíð vitjað, onkuntíð fýra ferð um árið.

Í tey fimtan árini teir hava búð í Keypmannahavn hevur ikki veri nógv útskifting í bólkinum. Jón flutti aftur til Føroyar og Nólsoyingurin Sigurd Thomsen tók yvir. Eisini spældi basleikarin hjá Týr, Gunnar, trummur fyri Petur, meðan hann í Sveis.

Í dag, 20 ár seinni, eru allir í bólkinum væl lisnir menn búsettir í Keypmannahavn. Jens Harry arbeiðir á Statens Serums Institut sum farmaceutur, Sigurd er akkustik verkfrøðingur, meðan Jóannes og Petur hava ph.d. grad og granska á Københavns Universitet.

Eitt hevur ikki broytt seg, so skjótt teir hava møguleika fyri at spæla til dans ella konsert, blaka teir alt arbeiði frá sær og herja á.

Og 20 ár seinni verður sama stað har teir byrjaðu, nemliga TB húsið, ið húsar teirra 20 ára jubileum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardaign:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, Hitin millum 3 og 7 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -6 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 6 |
| Tromsø | -1 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -6 |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | -1 |
| Helsinki | -9 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | -1 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 18 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 13 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ







**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1032 hPa. við Írland fer spakuliga vestureftir. Eitt brúgvalag við Føroyar fer suðureftir.

**Komandi nátt:**
Hátrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og mennist. Brúgvalagið í Grønlandsfjørðinum fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/03 kl. 06⁰⁰ – 06/03 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í mars: -11,0° -
Mesti hiti máldur í mars: +11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 05/03 kl. 06⁰⁰ – 06/03 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mars: 10 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. mars Seinna kvarter
12. mars Mánin longst frá jørðini
15. mars Tendring

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. mar. | 03:40 | 16:02 | 02:40 | 15:02 | 02:55 | 15:17 | 05:40 | 18:02 | 06:40 | 19:02 | 01:55 | 14:17 | 00:55 | 13:17 | 03:55 | 16:17 | 04:55 | 17:17 | 03:25 | 15:47 | 04:40 | 17:02 |
| 12. mar. | 04:22 | 16:42 | 03:22 | 15:42 | 03:37 | 15:57 | 06:22 | 18:42 | 07:22 | 19:42 | 02:37 | 14:57 | 01:37 | 13:57 | 04:37 | 16:57 | 05:37 | 17:57 | 04:07 | 16:27 | 05:22 | 17:42 |
| 13. mars | 05:00 | 17:18 | 04:00 | 16:18 | 04:15 | 16:33 | 07:00 | 19:18 | 08:00 | 20:18 | 03:15 | 15:33 | 02:15 | 14:33 | 05:15 | 17:33 | 06:15 | 18:33 | 04:45 | 17:03 | 06:00 | 18:18 |
| 14. mars | 05:36 | 17:55 | 04:36 | 16:55 | 04:51 | 17:10 | 07:36 | 19:55 | 08:36 | 20:55 | 03:51 | 16:10 | 02:51 | 15:10 | 05:51 | 18:10 | 06:51 | 19:10 | 05:21 | 17:40 | 06:36 | 18:55 |
| 15. mars | 06:13 | 18:32 | 05:13 | 17:32 | 05:28 | 17:47 | 08:13 | 20:32 | 09:13 | 21:32 | 04:28 | 16:47 | 03:28 | 15:47 | 06:28 | 18:47 | 07:28 | 19:47 | 05:58 | 18:17 | 07:13 | 19:32 |


Forelskað?
Vís tað í Sosialinum

Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo